TÍÐARGREIN

Viðmerking til eina oddagrein:

Hvussu høga prioritering skal vanligt vit og skil fáa?

Heri Mohr

Í einum demokratii má tað altíð vera fólk við vanligum viti og skili og við góðum menniskjaligum eginleikum, sum verða vald til ta politisku brápannuna, meðan hon eigur at verða fyrisitin av dugnaligum, væl lærdum við hægstu embætisútbúgving, loyalum embætisfólki uttan mun til kyn og politiskan lit, skrivar Heri Mohr í viðmerking til eina oddagrein í Sosialinum um krøv til politikarar

Góði Eirikur Lindenskov.

Í tínari oddagrein í Sosialinum nr. 123 "Útbúgving í evstu leiðslu" setur tú spurningin, um "vit eiga at seta landsstýrisfólki krøv um útbúgving." Tú sigur, at tað er "nátúrligt at seta hægri krøv til fólkaumboðandi politikarar," og at "í Danmark kemur tað ikki fyri, at ein ráðharri ikki hevur hægri útbúgving."

Hetta seinra er ikki heilt satt, tí síðan 1942, tá ið Stauning legði frá sær, hava 6 statsministarar verið í Danmark uttan "hægri útbúgving." Ein var goymslumaður, ein var typografur os.fr.

Tú sigur, "at tað er ein suksé [?], at øll í Føroyum kunnu gerast tinglimir ella landsstýrisfólk."

Álvaratos, nær gjørdist tað ein succes, at vit kunnu gerast løgtingslimir ella fáa landsstýrissess? Var tað 1. apríl 1948?

Men so sigur tú, at "okkum tørvar vælútbúgvið fólk í hægstu politisku størvum, meðan fólk við lægru útbúgving eisini skulu hava ein møguleika."

Hvussu høga prioritering skal vanligt vit og skil fáa?

Í einum demokratii má tað altíð vera fólk við vanligum viti og skili og við góðum menniskjaligum eginleikum, sum verða vald til ta politisku brápannuna, meðan hon eigur at verða fyrisitin av dugnaligum, væl lærdum við hægstu embætisútbúgving, loyalum embætisfólki uttan mun til kyn og politiskan lit. Í so máta er fólkaræðið í Danmark væl fyri við embætisstætti á høgum støði.

Tíverri er tað so, at toppembætini í landsfyrisitingini í ávísan mun verða sett av óroyndum fólki við beint loknari universitetsútbúgving. Tað er ikki nóg gott.

Vit áttu at lært av tí danska embætisverkinum og "sett við" ungar cand. jurar og cand.politar,ið ætla sær embætisvegin, í eina eitt- til tveyára starvstíð á donskum ráðharrastovum, meðan sessir bíða eftir teimum í okkara landsfyrisiting. Ummæli frá avvarðandi ráðharrastovum er sjálvsagt krav. Minnist meg rætt, høvdu tveir juristar í tí nýklakta heimastýrinumi verið fulltrúar á ráðharrastovum í Keypmannahavn, áðrenn teir komu í hægstu embætini í Tinganesi.

Landsstýrið átti at fingið skipaða avtalu við ta donsku stjórnina um eitt slíkt samstarv.

Sum kunnugt kom heimastýrislógin í gildi 1. apríl 1948. Tað fyrsta landsstýrið varð mannað við tveimum royndum sýslumonnum, einum royndum verkfrøðingi og einum skilamanni av Sandi. (Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin.)

Tænastu- og skrivstovufólk við drúgvum royndum á amtskontórinum, fútakontórinum, dómarakontórinum og aðrastaðni frá mannaðu ta nýggju landsfyrisitingina. Tey vóru øll føroyingar.

Heimastýrislógin gav okkum ein nýggjan politiskan identitet. Lóggevandi løgting og eitt landsstýri. Frá fyrsta degi varð farið undir at menna eina politiska, fíggjarliga, mentanarliga og sosiala fyrisiting. Sera stórar avbjóðingar lógu framman fyri stavn.

Hóast sera vánaligar tíðir í 50-árunum við stórum arbeiðisloysi, og fólk í túsundatali rýmdu av landinum, ber til at siga, at tey fyrstu 20 árini við "sveinastykkinum heimastýrið" var ein epoka við politiskum tryggleika í Føroyum. Í fyrsta lagi tí í hesum tíðarskeiði kom tann sosiali tryggleikin – politiskt og fíggjarliga – í góða legu. Í øðrum lagi er tað eingin loyna, at okkara samfelag var niðurundirkomið og kravdi stórar íløgur til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum og til landsvegir, havnir, berghol, flogvøll, SEV o.a.m. Løgtingið gjørdi nógvar lógir til menning av skipaflotanum og útvegaði fígging til SEV.

Í 1964 játtaði fólkatingið milliónir í stórum tali yvir fleiri fylgjandi ár til ein nýggjan grunn: Investeringsfonden for Færøerne/Íleggingargrunnurin fyri Føroyar. Hetta skilagóða tiltakið varð veruleiki, meðan sjálvstýrislandsstýrið (Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin) ráddi fyri borgum í 1963-1966. Seinasta stóríløga úr hesum grunni var, tá ið fólkatingið fyri nøkrum árum síðani broytti lógina til grunnin soleiðis, at hann kundi fíggja neyðugan studning [annars veitti grunnurin lán og ikki studning, soleiðis gjørdist hann við rentutilskrivingum milliarda sterkur] til leingjan av flogvøllinum og dagføring av terminalinum til flogvøllin.

Her kunnu vit av sonnum siga, at heimastýrislógin og umrøddi grunnur var stór succes.

Tú sigur, at tað er "nátúrligt at seta hægri krøv til fólkaumboðandi politikarar." Her hugsar tú ætlandi um løgtings- og býráðslimir. Júmen, Eirikur, hvussu skulu slík krøv formulerast og setast í gildi?

Í norðanlondum tosa tey við stúran um "akademiskt proletariat" orsakað av, at fleiri akademikarar verða framleiddir, enn arbeiðsmarknaðurin hevur brúk fyri.

Til hetta er fyrst at siga, at nakað proletariat í vanligum týdningi hava vit ongantíð havt í Føroyum. Okkara forfedrar vóru fátøk fólk, men proletarar vóru tey als ikki. Sum tú veitst, uppstóð fyribrigdið proletariat í tí gamla Romaríkinum og so aftur við industrialiseringini í Europa (Onglandi) fyri eini 200 árum síðani.

Okkara politikarar mugu sjálvandi ansa væl eftir, at akademiskt proletariat ikki uppstendir í Føroyum.

Eg havi í skrift og talu áhaldandi roynt at greiða frá, hvussu landsstýrið 1998-2001 (Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin) við ósannindum, ørvitistosi, indoktrineringum billaði fólki inn, at ríkiskassablokkurin als ikki varð brúktur til lógbundin málsøki. Ja, tað gekk so langt, at landsstýrið við propagandariti segði Føroya fólki, at vit als ikki høvdu brúk fyri blokkinum. Uppaftur verri var tað kanska, at tey,ið løgdu navn til hetta, trúðu upp á tað, tí, sum tú veitst, tveittu tey 366 milliónir av blokkinum á bláman í 2001.

Nøkur av hesum somu fólkavaldu frá 2001 rópa seg hás í dag frá tingsins røðarapalli um politikarar,ið lúgva!

Í einum brævi úr Italia skrivaði Georg Brandes um kvinnurnar har suðuri við teirra vøkru eygum o.s.fr. Í brævinum spyr hann: "Er der kvinder af sådant malm andensteds end her?"

Vit kunnu ósmæðið svara: jú, í Føroyum, í løgtinginum. Men tíverri kemur tað fyri, at vakurleikin fær sprungur, meðan tær eru á pallinum ein heitan dag í løgtinginum.

Stutt síðani fekk Granskingarstovnurin eina stóra millióna-upphædd frá løgtinginum. Upphæddin var fíggjað av ríkiskassablokkinum upprunaliga oyramerkt til sjúkrakassagrunnin, sum var 100% fíggjaður av ríkiskassablokkinum + limagjøld. Tað hevði ikki verið meira enn sjálvsagt, at fjølmiðlarnir greiddu

Eg havi í skrift og talu áhaldandi roynt at greiða frá, hvussu landsstýrið 1998-2001 (Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin) við ósannindum, ørvitistosi, indoktrineringum billaði fólki inn, at ríkiskassablokkurin als ikki varð brúktur til lógbundin málsøki

Heri Mohr